## DAGSINS MEINING

# Samgongan ætlar at bróta stýrisskipanarlógina

Tað má vera mangur maður, ið lítir aftur á sjeytiárini og fyri sovítt eisini áttatiárini, tá Tjvfl proklameraði blokkstuðulsskipanina sum eitt stórt framstig á sjálvstýrisleið. Tað er beinleiðis ósatt, tá núverandi samgonga roynir at fyrigykla fólki, at tað ongan veg hevur gingið við yvirtøkum. Tað er ein beinleiðis niðurgering av teimum monnum, ið hava rátt fyri borgum á hesum landi tey seinastu nógvu árini. Hvør minnist ikki samgonguna við Atla Dam, Finnboga Ísakson, D P Danielsen og Petur Reinert sála á odda, ið sat frá 1974 – 1978 og ivaleyst var tann samgongan ið hevur tikið okkum mest fram á sjálvbjargnisleið?

At hendan samgongan onga yvirtøka hevur framt í hesum valskeiði og hevur hækkað blokkin við prístalinum, eigur man ikki at lasta hvørki undanfarnar ella komandi samgongur fyri.

Flogvøllurin skuldi yvirtakast, men sjálvt tað málið megnaði núverandi samgonga ikki at loysa. Nú vil man fyri at kompensera fyri tað koma við einari 10 ára plan, ið flott og elegant loypur Stýrisskipanarlógina um og eisini yvirsær tað faktum, at tað eru tey, ið eru 10 ára gomul í dag, sum skulu siga hvar skápið skal standa um tvey valskeið.

Ein av orsøkunum til at vit hava val 4 hvørt ár er, at veljaraskarin ikki er tann sami. Veljaraskarin hevur eisini – og hettar tykist samgongan hava gloymt - tað privilegium í einum demokratiskum samfelagi at broyta meining, skifta flokk o.s.fr.

Stýrisskipanarlógin var millum annað gjørd fyri at forða slíkt sum hendan samongan roynir í dag. Stýriskipanarlógin heimilar ikki bindandi fólkaatkvøður, og tí krevur ein slík atkvøða eina broyting í Stýrisskipanarlógini, ið má fremjast av tveimum Løgtingum. Hvat sigur Lógardeildin í Tinganesi? Hvat sigur Løgtingsformaðurin? Hvat fer Løgtingsins Umboðsmaður at siga? Alt hettar fáa vit vónandi svar uppá í næstu framtíð.

Hendan samgongan kundi tað sama lagt út til eina fólkaatkvøða at minka skattin við 2% um árið tey næstu 20 árini. Hví ikki eisini leggja eina samferðsluætlan út til fólkaatkvøðu, ið definerar, nær øll berghol skulu gerast tey næstu 12 árini?

Einki forðar fyri at fremja yvirtøkur undir heimastýrislógini, og eingin yvirtøka er nakrantíð tikin aftur av dønum. Allir flokkar á tingi hava sagt seg vilja fremja yvirtøkur undir heimastýrislógini – eisini Sambandsflokkurin. Tað ódemokratiska er, at hendan samgongan, ið einki hevur fingið á skaftið á sjálvstýrisleið, skal taka rættin frá komandi ættarliðum av politikarum og komandi veljarum at yvirtaka eftir førimuni og umstøðum.

**Sosialurin**

## NØVN Í VIKUNI

### Minningarorð um Heidi Jensen

*f. 30. apríl 1970, d. 10. desember 2000*

Góða Heidi, tú vart eitt tað yngsta á okkara skrivstovu, so ikki høvdu vit væntað, at tú skuldi vera tann fyrsta at fara - bara 30 ára gomul.

Tað tykist ikki at geva nakra meining, menniskjaliga talað, tí sum ein ung mamma við tveimum smáum børnum vildu vit mett, at tað var so nógv brúk fyri tær. Í staðin fyri er títt pláss tómt - bæði í heiminum og á arbeiðsplássinum.

Hóast tú vart so ung, Heidi, so var kortini nakað vaksið yvir tær, og allar vit "gomlu" kendu okkum væl saman við tær. Hetta er helst komið av teimum royndum, ið tú hevur verið ígjøgnum – bæði tú persónliga og familjan.

Sjálvandi vistu vit, at tú hevði eitt álvarsamt brek, men tað var jú undir kontroll. Stundum skemtaði tú við, at tú gekk uppá battarí, men ikki vardi tað okkum, at tað skuldi taka lívið av tær á so ungum aldri.

Óivað hevur tú hugsað meira enn vit um, at tað kundi vera so skjótt, men tað merktist ikki nógv á tær. Tú hevði ein so stuttligan óhátíðarligan hátt at siga tingini, og tað var mangan so beinrakið, at sjálvt álvarsamar samrøður fingu eitt brá av skemti.

Tú skuldi annars byrja aftur at arbeiða um nakrar



fáar dagar, aftaná longda barsilsfarloyvið, og tað er so tungt og ófatiligt at vita, at tú ikki kemur aftur til arbeiðis,- tí tú ikki longur ert millum tey, ið liva.

Stundum hevur tú hugt inn á gólvið hesa tíðina saman við Hildu, sum sat so fitt og teknaði, meðan vit fingu okkum eitt prát inni í kaffistovuni, og tað tykist so stutt síðani, at tú vart inni á skrivstovuni við lift við tí lítlu dóttrini, so vit kundu sleppa at síggja hana.

Vit, starvsfelagir tínir, sakna teg, góða Heidi, og vit vita, at tú ert nógv saknað av tínum kæru. Vit hugsa um tína familju, sum er so hart rakt, men sum skrivað stendur, ikki ein spurvur fellur til jarðar, uttan at tað er Faðirsins vilji. Má hetta vera tykkara uggi, og so tað, at Heidi var búgvin at fara.

Harrin signi og hjálpi tykkum øllum. Friður veri við minninum um teg, góða Heidi.

**Ása**

### Minningarorð um ommu og langommu okkara Súsanna Hentze

*f. 17. desember 1915*
*d. 29. januar 2001*

Omma okkara er farin, men vit vilja minnast hana alt okkara lív.

Hon var mamma foreldur okkara og langomma at børnum okkara.

Fegin vildu vit at børnini vóru eldri, so tey kundu minnast aftur á teg, men so verður tað okkara rætta at minna tey á, hvussu fitt og góð tú var við tey og okkum øll ommubørn!

Tá vit vóru lítil, vistu tú altíð okkurt spennandi og áhugavert at siga frá. Las okkum søgur úr »Skýmingarløtuni« og leiddi okkum í hagan, har tú segði okkum frá hvussu ymiskar blómur itu, vísti okkum fuglareiður, »á Helluni«, og segði okkum frá um ymiskar hendingar, ið høvdu verið tær fyri!

Sum vit eldust og fluttu heimanífrá, var tað ikki altíð so lætt at koma suður til Skúvoyar at vitja teg.

Men tá vit so vóru har, á tíni gátt, fingu vit altíð eitt stórt smíl og opnan favn at koma inn til. Maturin, tú gjørdi, verður eitt av tí, ið vit fara at sakna mest! Tín spennandi háttur at uppbaka sós, tína rullusteik og



tað allar lekkrasta, tín »rís a la mande«!

Nógv hava roynt at eftirlíkna hann, men eingin dugdi eins og tú!

Og nú ert tú so farin, farin heim til Jesus!

Tað var seint á kvøldi, at mamma og beiggi mín komu á mínar dyr; eg sá við eitt, at okkurt var áfatt. Mamma segði grátandi frá, at tú ikki longur var hjá okkum. Eg stóð heilt lamma, eg veit at vit øll skulu doyggja einaferð, men tá so deyðin kemur, er tað altíð verri enn ein hevur fyrireikað seg til.

Um kvøldið hevði tú verið til døgurða »norðuri á Handskanum«, tá hevði tú tað gott! Mánamorgunin vildi kroppur tín so ikki longur akta, hann orkaði ikki at gera dagsins verk enn einaferð, at reisa seg enn einaferð og ganga sum hann var vanur at gera.

Mánakvøldið læt tú eygu tíni aftur og fór til abba. Honum, sum tú hevur longst eftir so nógv hesar síðstu mánaðirnar.

Nú eru tit aftur saman!

Eg vil enda við einari bøn, ið tú lærdi okkum, ein bøn, sum tú bað hvønn dag á knæ við songarstokkin.

Eg minnist, tá tú tók okkum inn til tín og segði: »Hygg! Nú skal omma læra teg«! Síðan bað tú:

*Bed å Jesus*
*Bed for mig*
*Ber mig ind i dit Himmerike*
*Der at leve*
*Der at bo*
*I en evig*

*Fryd og ro*

*Lad mig altid elske dig*
*Du som beder godt for mig*
*Gud vær min ven*
*Gud hør min bøn*
*Og det for Jesus skyld*

*Eg befalli meg í Jesu hond*
*Lív og likam, sjel og ond*
*Í hesi nátt*
*Ævigt og altíð*
*Amen*

Við hesum vilja vit lýsa frið yvir ommu og langommu okkara.

*Vegna ommu- og langommubørnini*
**Sjanna!**

## Tøkk

Hjartans tøkk veita vit tykkum øllum, sum gleddu okkum á gullbrúdleypsdegnum tann 18. november 2000.

Takk tit, sum vaktu okkum við sangi á morgni, tit, sum gjørdu alt so vakurt og hugnaligt, og tit, sum borðreiddu fyri okkum í Ebenezer.

Takk fyri gávur, fjarrit og uppringingar.

Vit ynskja tykkum Harrans signing í hesum nýggja árinum.

*Kærar heilsanir*
**Nelly og Otto**


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo

John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Mentan:**
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




Rørslutarnaður við strandafaraskipum:

# Má halda til á bildekkinum

**Mikkjal Ørvarodd samanlíknar strandfaraskip við fongsul, tí hann sleppur ikki av bildekkinum, meðan skipini sigla**

TRYGD
*Eyðun Klakstein*

Umstøðurnar umborð á fleiri av strandfaraskipunum gera, at rørslutarnað sleppa ikki av bildekkinum, meðan skipini sigla.

Ein av teimum rørslutarnaðu, sum ferðast nógv, er Mikkjal Ørvarodd. Hann býr á Argjum, men er ættaður úr Sandoynni, og hann hevur eisini skyldfólk í Vágum og Klaksvík.

– Eg havi ongantíð roynt at sitið í fongsli, men eg kann ímynda mær, at tað mann vera nakað tað sama sum at sigla við strandfaraskipum, sigur hann.

– Eg sigli javnan við Tróndi, Dúgvuni og Ternuni, og tá havi eg ongan annan møguleika, enn at sita í bilinum, meðan siglt verður, tí eg kann ikki bjóða til at fara upp gjøgnum trappurnar.



*– Eg havi ongantíð roynt at sitið í fongsli, men eg kann ímynda mær, at tað mann vera nakað tað sama sum at sigla við strandfaraskipum, sigur Mikkjal Ørvarodd, sum er rørslutarnaður.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Bara Smyril

Mikkjal Ørvarodd nýtir fyri tað mesta høkjur og klárar seg væl á sløttum, men hann fær ikki gingið gjøgnum trappur, og við hvørt situr hann í koyristóli.

– Tað er bara Smyril, sum hevur elevator, so har sleppi eg uppá, men við hinum skipunum, verði eg noyddur at halda til á bildekkinum, sigur hann.

– Fyri góðari viku síðani hendi álvarsligt óhapp umborð á Dúgvuni, har ein bingjubilur fullur av fóðri koppaði.

Tíbetur vóru hvørki bilar ella fólk í nánd, og tí spurdist iengin mannskaði burturúr, men tað skal lítið til fyri at ímynda sær, at persónbilar stóðu undir liðini á bingjubilinum.

### Sleppur ongan veg

Í vikuni segði tekniski stjórin á Strandferðsluni við Sosialin, at fólk hava ikki loyvi at verða á bildekkinum, meðan siglt verður, og tí eiga fólk ikki at koma í nánd av slíkum óhappi.

Men rørslutarnað uppliva støðuna øðrvísi.

– Eg eri altíð á bildekkinum, tá eg sigli við Dúgvuni, Tróndi ella Ternuni, tí eg sleppi onga aðrastaðni. Hesini skipini hava ongan elevator, tí kann eg ikki annað, sigur Mikkjal Ørvarodd.

– Einasti møguleikin, sum manningin á hesum skipum hevur fyri at forða mær fyri at verða á bildekkinum, er, um tey nokta mær umborð, og tað havi eg ikki verið úti fyri, sigur hann.

– Konan plagar ofta at ferðast við mær, og hon situr sjálvandi í bilinum hjá mær, meðan vit sigla.

Mikkjal Ørvarodd heldur, at Strandferðslan átti at hugsa meiri um tey rørslutarnaðu, so tey eisini sleppa av bildekkinum og kunnu ferðast trygt við strandfaraskipunum.

# Nærkast fullari høll

**Forsølan til konsertina við Creamy hevur gingið strúkandi**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

Leygardagin um eina viku fer hálvføroyska poppduoin Creamy at hava konsert í ítróttarhøllini í Runavík. Sølan av atgongumerkjum til hesa konsertina hevur gingið sera væl, og nú er við at verða útselt.

Creamy kemur til Føroya í Sambandi við nýggja konsertferð. Bólkurin hevur givið nýggja fløgu út, og nýggj framførsla er løgd til rættis. Alt hetta verður at síggja og hoyra í Runavík komandi vikuskfiti.

Nú er eisini avgjørt, at Kular Røtur úr Klaksvík, sum eru sera væl dámdar av børnum og ungum, fara eisini at verða við á konsertini hjá Creamy. Røturnar fara at hita upp fyri høvuðsnavnið úr Danmark.

Í sambandi við konsertina verður syrgt fyri góðum ferðasambandi norðan og sunnanífrá.


